# FØÐINGAR

16. januar fingu Fróði Andersen, Tvøroyri og Vígdis Jacobsen, Lopra, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4130 gr.

18. januar fingu Alvin og Katrina Joensen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3420 gr.

31. januar fingu Andrea á Regni og Kjartan Højgaard, Saltnes, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3100 gr.

31. januar fingu Joan Simonsen og Jóannes Henriksen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3160 gr.

1. februar fingu Ragna Maja Kruse og Jóannes Egholm, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2800 gr.

2. februar fingu Eydna M. Iversen og Sámal Lindenskov, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3500 gr.

2. februar fingu Hanna H. Joensen og Thordur Andreassen, við Norðskála, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2960 gr.

4. februar fekk Rigmor í Lon, Miðvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

5. februar fingu Sólfríð og Esmar Fjallstein Petersen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

5. februar fingu Súsanna Winther Poulsen og Jarvin Feilberg Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3550 gr.

5. februar fingu Hervør og Suni Hermansen, Signabøur, eina dóttur, ið hevur fingið navnið Bjørg. Hon var 59 cm. long og vigaði 4750 gr.

5. februar fingu Jastrid Langgaard og Jógvan Salomon Johannesen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.



Tann 20. januar fingu Óluva Frederiksen og Gundur Michaelsen, Viðareiði hesa fittu didduna. Hon var 52 cm. long og vigaði 2750 gr.



Hey, eg eiti Júst og hetta er Anja, lítlasysturin hjá mær. Hon var fødd 21. jan. vigaði 3060 gr. og var 51 cm. long. Foreldrini hjá okkum eita Ann og Jan Justesen og vit búgva í Kaldbak

# ANDLÁT

**31. januar**
Hjørdis Højgaard, Húsar, 72 ár.
Severina Pearson, Tvøroyri, 80 ár.

**01. februar**
Jóhanna Joensen, vanliga nevnd Hanna hjá Mikkjali, Haldórsvík, 88 ár.
Charles Hauritz, Tvøroyri, 45 ár.

**03. februar**
Jákup Olsen, vanliga Jákup Zahle, Tórshavn, 58 ár.

**04. februar**
Petur Ludvíg, ættaður úr Fámjin, búsitandi í Esbjerg, 54 ár.
Hjørdis Hansen, fødd Matras, Norðoyri, 96 ár.
Anna Margretha Hansen, fødd Poulsen, á Sandi, búsitandi í Havn, 79 ár.

**05. februar**
Gudmund Djurhuus, Porkeri, 91 ár.

**06. februar**
Andreas Nýggjagarð, vanliga nevndur Dia, Hvannasund, 84 ár.

**07. februar**
Edith Mortensen, Oyndarfirði, 88 ár.

# TILTØK

### Gudstænastur Føstuinngangur
*Havnar kirkja:* kl. 11, Hans J. Joensen,biskupur
*Hvítanes:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Vágur:* kl. 11
*Leiti:* kl. 12.15, M. Telling
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Kollafjørður:* kl. 12, altarg., M. Bæk
*Bøur:* kl. 12, altarg., Inga P. Dam
*Fuglafjørður:* kl. 12, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 15, Uni Næs
*Hvannasund:* kl. 12, Elsa Funding
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Christianskirkjan:* kl. 11,
*Norðoya røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Húsar:* kl. 12, altarg., Niels P. Danielsen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Gjógv:* kl. 12, messa
*Funningur:* kl. 17, messa, Emil Olsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg. Talvan gongur fyri Heimamissiónini. Jógvan Fríðriksson
*Miðvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Dalur:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Tvøroyri:* kl. 11,
*Hov:* kl. 14, Ólavur Rasmussen

### Nardus samkoman í Havn
Evangel. møti við Torkil Terkildsen og Ole Rydland verður í Losjuni við Tinghúsvegin fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

### »Tíð til Gud«
Av tí at vit eru legutúr á Eiði, **verður einki møti** úti í Pálsstovu sunnukvøldið.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Borð Harrans – ímeðan verða smábørn ansaði í lítlasali. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evengel. fundur: Levi Joensen frá Malta í Hirtshals og aðrir úr Klaksvík tala. Sangkreftir úr Betesda luttaka við sangi.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa í Mariukirkjuni. Sunnudagsskúli kl. 14.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, Siv Joensen talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti. Kl. 18 Møti, Palli Petersen talar.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti. Bønarmøti hvønn mikudag kl. 15.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Steingrím Niclasen.
Týsdagin kl. 17 í KFUM: Várgleði fyri børn.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangelisk møtirøð við Svenning av Lofti og Poul Johan Djurhuus. Sangkórið og aðrar sangkreftir í samkomuni luttaka. Evni: Nú er lagalig tíð – nú er frelsudagurin. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Meinigheitin í Hoyvík
Gudstænasta verður sunnudagin kl. 11 í húsinum á Brekku 3, kl. 14 Sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla. Onki møti verður kl. 18.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti í húsinum á Brekku 3.
**Í samb. við at húsini hjá Meinigheitini, á Brekku 3 í Hoyvík, verða tikin í nýtslu, verður móttøka frá kl. 15 til kl. 18 sunnudagin**. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn. Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Sverra Steinhólm, Manskvartett syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

### Rhema á Hálsi
Mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Leygardagin kl. 9.00 Bønardagur.
Sunnudagin kl. 17 Møti við luttøku úr Solo Deo Gloria, Klaksvík. Kl. 17 er Sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

### Hvítusunnusamkoman
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

### Saron Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti. Telefonandaktin svarar á 424741.

### Missiónsvikan
byrjaði sunnudagin 3. feb. og heldur á til 10. februar. Leygardagin kl. 9.45 Morgunbreyð. Bíbliutími v/ Ásbjørn Jacobsen. Evni: »Heilaga samfelagið«. Kl. 16 Barnamøti v/ Marjun Biskupstøð. Kl. 20 talar Bergur D. Joensen, Ungdómskórið úr Vágunum syngur.
Kl. 22.30 Ungdómsløta. Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta og altarg., Uni Næs. Kl. 14.30 Felags sunnudagsskúli, kl. 18 talar Hilmar Danielsen, Streingjakórið í KFUM & K syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Náttturði aftaná. Kl. 21 Ungdómsløta. G-sus syngur og spælir.

### Losjan, Gøta
Hjartaliga vælkomin til ein tíma við bíbliuni sunnudagin kl. 19.30 v/ Karen J. Lund og Inger J. Hildershavn.

### Gøta
Ungdómsmøti verður í Kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 v/ Ólavur Magnussen, Nes.

### Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Hera Kjærbo. Filmur frá arbeiðinum verður sýndur.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Tummas Jákup Høj o.fl. Barnamøti kl. 17.

### Nebo, Toftir
Sunnukvøldið kl. 18 verður evni Missión og »hvat er ein søguskrivari«. Eisini verður sangluttøka.

### Lívsins Orð
Barnamøti verður fríggjadagin kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 17 verður møti, har tey, sum hava verið í Kina greiða frá túrinum. Liljurnar møta mánadagin kl. 17.

### Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

### Missiónshúsið í Skopun
Í kvøld kl. 20 Bønarløta. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18 Møti. Mánakvøldið kl. 20 Bønarløta. Missiónsvikan verður í døgunum 13.-17. februar.

### Missiónshúsið í Skálavík
Í sambandi við leguna, verður ungdómsmøti leygarkvøldið kl. 20, Kajberg Davidsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl 18 Møti við Tove og John Hammer. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Porkeri
Missiónsvikan verður í døgunum 19.-24.2. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Sámal Jákup Joensen talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið fyri allar kvinnur.

### Betel Vágur
Fundir við Poul Færø og John í Skemmuni verða í kvøld og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18.

### Møtiskrá hjá Hera Elttør í DK
Fríggjadagin 8. og leygardagin 9. februar í Dronninglund missiónshúsi, bæði kvøldini kl. 19.30.
Mikukvøldið 13.2. í Skive missónshúsi.
Hóskvøldið 14. í Ålestrup missiónshúsi.
Leygardagin 16. í Carmel í Århus.
Altíð vælkomin at ringja ella skriva til trúboðaran tlf. 97473786 og mail: herielttor@mail.dk

### Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

### Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Frælsi, hvat er tað? Jú men, hvørt barn veit hvat frælsi er. Frælsi er tá ið…! Ja, ikki satt? Tað er als ikki so lætt at greiða frá, hvat frælsi er.

Onkuntíð kundu vit hugsa okkum tað soleiðis, men alla tíðina renna vit okkum móti einum múri. Latið okkum ímynda okkum eitt barn í móðurlívi. Innibyrgt til allar síður. Fullkomuliga bundið av øllum rørslum, ið mamma ger. Eftir at tað er borið í heim, kundu vit hugsa okkum, at hesin lítli skapningurin vildi brúktt sítt frælsi nú tað er frítt til loft og veggja, men nei. Við tað sama, at barnið er sloppið út úr innilæstum móðurlívi, vil tað vera fevnt av móðurørmum. Tað lítla barnið veit als ikki, hvat tað skal brúka alt hetta frælsið til. Seinni í lívinum kemur so uppalingin við øllum tess til tíðir føstu teymum. Gævi eg nú kundi sloppið at rátt mær sjálvum. Men so løgið tað ljóðar, so gevur hin so nevnda fría upppalingin oftast tað úrslit, at mong børn og ung suffa eftir at mørk verða sett fyri hvat tey kunnu.

Ella hvussu við teimum fyrrverandi hjálondunum í tí triðja heiminum. Tey eru nú frí, sjálvstøðug einaveldi. Orðið frælsi er í sjálvum sær meiningsleyst. Frælsi frá einum er at vera bundin at nøkrum øðrum.

Hvar fáa vit so at vita hvat frælsi er? Latið okkum hoyra, hvat Halgabók sigur. Í Guðs orði verður ikki so lítið sagt okkum bæði beinleiðis og óbeinleiðis um hetta, men lat her bara verða nevnt eitt ørindi: »Tí at tann trælur, sum er kallaður í Harranum, er frímaður Harrans; á sama hátt er tann, ið kallaður er sum frælsur maður, trælur Krists«. 1. Korintbræv 7.22.

Amen!

**J. S. Myllhamar, trúboðari**



# TILTØK

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 311391/261516.*

### Tilhaldið
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 11. februar*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
**kl. 15-18 Drekka og føstubollar**
**kl. 15 Føstuskemt**
Elin D. Johannesen
*Týsdagin 12. februar*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát um Tinganes
*Mikudagin 13. februar*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 14. februar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Dominobinding og annað
*Fríggjadagin 15. februar*
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

### Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

### Náttarravnarnir í Tórshavn
**Tín** stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

### ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

### AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

### Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

### Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

### Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### MÁF
*(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)*
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International, Føroya deild
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### MBF
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

### Giktafelag Føroya
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

### Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

### Sinnisbati
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

### Javni
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

### Cøliakifelag Føroya
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

### Nýrafelagið
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

### Heilafelagið, MBF-húsið
*Íslandsvegur 10*
*tlf./fax 321520*
Føst telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.n-orden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

### Føroyingafelagið í Esbjerg
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

### Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

### Føroyingafelagið í Århus
*Vestergade 48D*
*8000 Århus C*
*Tel. 86 18 06 04*
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldscafé kl. 22-03.
Reglulig tiltøk: Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Bókasavn: Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16.00-18.00.
MFS-stovan hevur opið hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Kassameistari er at hitta hvønn mikudag kl. 16.00-18.00.
Flogbóltur er í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16.00-18.00. Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16.00-18.00. Innandura fótbóltur í Hasselagerhøllini fríggjadag kl. 21.00-23.00.

# SILVURBRÚDLEYP ÚTSETT

Vegna serligar umstøður verður silvurbrúdleypið hjá Marjun og Jákup Frants Larsen fyribils útsett.

# BRÚDLEYP

Í dag, 9. februar kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Ann-Mari Borgarsdóttur Nicolaisen, Vestmanna og Magni Vatnhamar Mouritsen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum fyri innbodnum kl. 19.00.

Í dag kl. 14.00 siga Rannvá Heinesen og Bogi Dam av Argjum ja til hvørt annað í Samkomuni Immanuel. Brúdleypsadr.: Pálsstova, Mykinesgøta 7, Tórshavn.

Leygardagin 23. mars kl. 15.00 giftast í prestagarðinum á Nesi, Armgarð Arnbjarnardóttir Thomsen, Havn og Hans Martin á Regni, Toftir. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 16. mars á tlf. 441217, 227266 ella 220001

# SILVURBRÚDLEYP

Fríggjadagin 1. mars kunnu hjúnini Erla og Hallur Ellingsgaard, Oyndarfjørður, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda hendan dagin saman við teimum, verða biðin um at siga frá innan 15. februar á tlf. 444673.

# GULL- OG SILVURBRÚDLEYP

Leygardagin 23. februar kunnu hjúnini Jona og Jógvan Hans Joensen, Miðvágur, halda gullbrúdleyp. Sama dag halda hjúnini Inga og Ulrik Krogh, Miðvágur silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Miðvági 23. februar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gull- og silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 15. februar á tlf. 332439 ella 332851.

# GULLBRÚDLEYP

Mánadagin 4. mars kunnu hjúnini Hanna og Sámal Rasmussen, Søldafirði, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. februar á tlf. 441532 ella 226492.

# LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 9. feb.: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnudagin 10. feb.: Knud Jakobsen, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.